# Íløguavtala

| Navn | Tryggingarnummar |
| --- | --- |
| | |

| Bústaður |
| --- |
| |

| Telefon | Fartelefon | Teldupostur |
| --- | --- | --- |
| | | |

Við marknaðarrentu fært tú tann ágóða, sum marknaðurin gevur. Í góðum tíðum fært tú allan ágóðan av góðu gongdini. Møguleiki er tó fyri negativum avkasti í ávísum tíðarskeiðum, tá tað gongur minni væl.

Íløgurnar, ið LÍV ger, kunnu býtast í trý – partabrøv, lánsbrøv og alternativar íløgur (t.d. fastogn ella undirstøðukervi). Lutfallið millum íløgurnar er tengt at, hvat váðastøði tú ynskir. So hvørt tað nærkast til tú fær uppsparingina útgoldna, tillagar LÍV sjálvvirkandi lutfallið, soleiðis at íløguváðin lækkar.

Saman við tær finna vit títt váðastøði, sum tekur støði í tínum váðafýsni, aldri og pensjónsaldri.

## Vel váðastøði

Eg ynski at áseta/broyta mítt váðastøði til tað, sum eg havi valt niðanfyri, og at valið skal fevna um allar mínar inngjaldingar og mítt uppsparda virðið.

**Vel váðastøði niðanfyri. Set bara ein kross – ella verður valið ógildað.**



☐ **Varið**

Miðað verður eftir, at uppsparda virðið verður sett í íløgur soleiðis: **55% lánsbrøv og 45% partabrøv og alternativar íløgur.**

Profilurin hevur lutfalsliga stóran part av lánsbrøvum. Profilurin hevur avmarkaðan váða, men eisini eitt lágt væntað avkast. Tá ið 15 ár eru eftir til pensjónin verður útgoldin, lækkar íløguváðin árliga.



☐ **Miðal**

Miðað verður eftir, at uppsparda virðið verður sett í íløgur soleiðis: **23% lánsbrøv og 77% partabrøv og alternativar íløgur**.

Profilurin liggur millum "Varið" og "Høgt" váðastøði. Væntaða avkastið og váðin er tískil eisini ímillum nevndu profilarnar. Tá ið 15 ár eru eftir til pensjónin verður útgoldin, lækkar íløguváðin árliga.



☐ **Høgt**

Miðað verður eftir, at uppsparda virðið verður sett í íløgur soleiðis: **15% lánsbrøv og 85% partabrøv og alternativar íløgur.**

Profilurin hevur tann størsta partin av partabrøvum og øðrum íløgum. Profilurin hevur eitt høgt væntað avkast, men eisini ein høgan váða. Tá ið 15 ár eru eftir til pensjónin verður útgoldin, lækkar íløguváðin árliga.



☐ **Partabrøv**

Miðað verður eftir, at uppsparda virðið verður sett í virðisbrøv soleiðis: **100% partabrøv.**

Profilurin hevur bert partabrøv og aðrar íløgur. Profilurin hevur tískil tað hægsta væntaða avkastið, men samsvarandi eisini nógv størsta váðan. Váðin lækkar ikki, óansæð ár til útgjald.

*Verður einki valt ella er valið ógyldugt, so verður váðastøði sett til **Miðal**.*

**TRYGGINGARFELAGIÐ LÍV**
Postboks 206
Kopargøta 1
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 31 11 11
liv@liv.fo
www.liv.fo

# Íløguavtala

Valið fær virknað tann 1. í mánaðinum eftir, at LÍV hevur móttikið útfylta skjalið. Íløgur og broytingar verða framdar samsvarandi teimum hjá LÍV galdandi íløgutreytum, ið eru at finna á **www.liv.fo**

**Eg vátti við mínari undirskrift niðanfyri at:**

– eg havi fingið vegleiðing og ráðgeving frá LÍV um tey ymisku váðastøðini og hvørjir váðar eru við teimum ymisku støðunum.

– eg havi sjálv/ur vigað míni ynski og væntan um avkast í mun til váðan fyri tap, og at tað er eg, sum havi valt mítt váðastøði og harvið hvussu mín eftirløn skal investerast. Mín eftirløn kann tískil hækka og lækka. LÍV kann ikki ábyrgdast fyri møgulig tap,

– eg eri greið/ur yvir at tær forsagnir, ið eg havi fingið, um framtíðargongdina í íløgunum, byggja á greiningar av búskaparligum faktorum, og at forsagnirnar ikki eru nøkur trygd fyri at gongdin verður soleiðis sum forsøgnin sigur. Eg kann tískil ikki gera nakað krav galdandi móti LÍV, um so er at veruliga gongdin verður verri enn forsagnirnar ella mín egna væntan,

– eg eri gjørdur varug/ur við, at eg eigi at gera nýggja meting av mínum egna váða- og váðastøði í minsta lagi hvørt 5. ár og í øllum førum tá ið eg fylli 50, 55 og 60 ár, ella um míni lívsviðurskifti broytast (t.d. hjúnalag, børn ella hjúnaskil-naður), og

– eg havi fingið útflýggjað eitt avrit av galdandi íløgutreytunum hjá LÍV og at eg við hesum góðtaki íløgutreytirnar.

# Dato og undirskrift

| Dato | Undirskrift |
| --- | --- |
| | |

**TRYGGINGARFELAGIÐ LÍV**
Postboks 206
Kopargøta 1
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 31 11 11
liv@liv.fo
www.liv.fo